# 2 x innbrot á Vertshúsinum

**Um tvey tíðina í nátt gjørdist ein maður í Havn so tystur, at hann visti sær eingi onnur ráð enn at bróta inn á Vertshúsið, fyri at stilla sær tostan. Hann slapp tá avstað við trimum fløskum. Hálvan annan tíma seinni royndi hann at endurtaka bragdið, og breyt inn á Vertshúsið einaferð afturat**



INNBROT

*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Klokkan 01.55 í nátt, fór ávaringarskipanin á Vertshúsinum í Havn í gongd. Ein maður var vorðin so mikið tystur, at hann sá ongan annan útveg enn at bróta inn, fyri at stilla sær tostan.

Ein maður av Vaktargarðinum var á staðnum beinanvegin, men tá var tjóvurin longu horvin við trimum fløskum av veikum alkoholi. Dagligi leiðarin á Vertshúsinum og løgreglan vórðu tilkallað, og Vertshúsið varð so kannað væl og virðiliga.

Dagligi leiðarin á Vertshúsinum sigur, at einki var tikið, hvørki úr kassanum ella nakra aðra staðni, fyriuttan tríggjar fløskur av veikum alkoholi, sum stóðu í barrini. Hon sigur, at maðurin ikki royndi at fara í kassan eftir peningi, men eftir øllum at døma bert hevur ynskt sær okkurt drekkandi.

Àvaringarskipanin varð sett til aftur, okkurt varð smíðað fyri brotnu hurðina, sum síðani varð stongd væl og virðiliga, og síðani fóru tey øll avstað aftur.

### Royndi einaferð enn

Men longu kl. 03.30 fór ávaringarskipanin á Vertshúsinum aftur í gongd. Maðurin mundi allarhelst hava hildið seg fingið ov lítið burturúr fyrstu ferð, og tí royndi hann einaferð enn. Men hesuferð var eydnan uppi.

Vaktargarðurin, sum fyrstur sær ávaringarskipanir, sum fara í gongd, boðaði alt fyri eitt løgregluni frá, og hon var skjót á staðið.

Maðurin var tá á veg inn eftir fleiri fløskum, ígjøgnum eitt vindeyga, sum hann hevði brotið. Maðurin var fullur, og løgreglan tók hann við á støðina, har hann í fyrsta umfari slapp at sova rúsin av sær. Síðani verður hann latin kriminaldeildini til avhoyringar.

Vakthavandi sigur, at tað er ilt at siga hvat maðurin fær fyri brotsverkið. Hann kann vænta sær alt frá treytaðum dómi til fongsul.

Vakthavandi sigur eisini, at talan er um ein gamlan kenning hjá løgregluni.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og landnyrðingi og regn av og á. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og fyrrapartin regn av og á, men seinnapartin minni vindur og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fleyr til gul av eystri ella av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og útsynningi og kanska okkurt ælið leygardagin, annars turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 11 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷6 |
| Nuuk | 1 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | ÷1 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 13 |
| Tromsø | 2 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 8 |
| Keypmannah. | 14 |
| Helsinki | 10 |
| Moskva | 7 |
| Berlin | 18 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 15 |
| Bukarest | 18 |
| Paris | 15 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 26 |
| Athen | 23 |
| Malta | 24 |
| Tunis | 33 |
| Beijing | 15 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 25 |
| New York | 12 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | – |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 22 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 989 hPa. eystan fyri Ísland fer í landnyrðing eystan og dýpist nakað. Eitt annað lágtrýst, 998 hPa. vestan fyri Írland fer í landnyrðing og dýpist somuleiðis.




Eitt djúpt lágtrýst sunnan fyri Írland fer spakuliga norðureftir. Hátrýstið sunnan fyri Hvarvið fer spakuliga eystureftir og viknar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 25/10 kl. 06⁰⁰–26/10. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 3,9°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° - Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,2 mm – mált frá 25/10 kl. 06⁰⁰–26/10 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 99,6 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

17. oktober: Mánin næstur jørðini
20. oktober: Fyrra kvarter
28. oktober: Fullmáni
2. novemb.: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 27. okt | 06.43 | 19.03 | 05.43 | 18.03 | 05.58 | 18.18 | 08.43 | 21.03 | 09.43 | 22.03 | 04.58 | 17.18 | 03.58 | 16.18 | 06.58 | 19.18 | 07.58 | 20.18 | 06.28 | 18.48 | 07.43 | 20.03 |
| 28. okt | 07.23 | 19.44 | 06.23 | 18.44 | 06.38 | 18.59 | 09.23 | 21.44 | 10.23 | 22.44 | 05.38 | 17.59 | 04.38 | 16.59 | 07.38 | 19.59 | 08.38 | 20.59 | 07.08 | 19.29 | 08.23 | 20.44 |
| 29. okt | 08.06 | 20.28 | 07.06 | 19.28 | 07.21 | 19.43 | 10.06 | 22.28 | 11.06 | 23.28 | 06.21 | 18.43 | 05.21 | 17.43 | 08.21 | 20.43 | 09.21 | 21.43 | 07.51 | 20.13 | 09.06 | 21.28 |
| 30. okt | 08.50 | 21.13 | 07.50 | 20.13 | 08.05 | 20.28 | 10.50 | 23.13 | 11.50 | — | 07.05 | 19.28 | 06.05 | 18.28 | 09.05 | 21.28 | 10.05 | 22.28 | 08.35 | 20.58 | 09.50 | 22.13 |

5 707265 100036 >